## Paris aftur í USA

Tony Paris, sum í vár fekk sekkin frá KÍ, virkar nú aftur sum venjari hjá St. Pede Raiders í USA. Hetta er felagið, har Paris var venjari, áðrenn hann kom til Klaksvíkar. Tony Paris skal í næstum upp til endaligu próvtøkuna sum UEFA A-venjari, og eftir hetta hevur hann loyvi at standa á odda fyri nýggja felagnum.



## Tevez bíðar eftir Real Madrid

Ivi er um framtíðina hjá argentinska áleyparanum, Carlos Tevez, sum spælir í West Ham í Onglandi. Tevez var ein av týdningarmestu leikarunum hjá West Ham í stríðnum fyri at yvirliva í Premier League, og nú eru fleiri av evropeisku stórfeløgunum eftir honum. Umboðsmaðurin hjá Tevez, Adrian Ruocco, sigur tó, at Tevez bíðar eftir Real Madrid. – Vit hava havt samband við Real Madrid, og eingin ivi er um, at Tevez vil til Madrid. Um Real Madrid ikki verður ein møguleiki, so eru fleiri onnur stórfeløg eftir honum, og tað er heldur ikki óhugsandi, at hann heldur fram í West Ham.

Skála-VB/Sumba 1-1 (0-1):

# Botnliðini gera um seg

**VB/Sumba misti í mun til AB. Men javnleikurin ber boð um, at botnliðini neyvan verða heilt so einsamøll, sum tekin annars hava verið um**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*VB/Sumba er framvegis niðasta liðið í Formula-deildini, men gongdin seinastu dystirnar bendir greitt á, at liðið væl kann vinna seg upp um niðurflytingarstrikuna*
*savnsmynd*

Talan var ikki um ta heilt stóru fótbóltsupplivingina, tá VB/Sumba vitjaði á Skála sunnudagin. Tað munnu gestirnir sum so eisini leggja vertin á, tí við einum stigi hildu teir fast um góðu gongdina, sum seinastu tríggjar dystirnar hevur kastað fimm stig av sær. Fimm stig, sum innibera, at munurin upp til niðurflytingarstrikuna alsamt er minkaður.

Hesa fer var eisini nær við, at øll stigini fóru suður um Suðuroyarfjør. Gamli málrevurin, Birgir Jørgensen var skjótur á bóltinum, tá Teitur Tausen stútaði hornaspark móti málinum, og stóð 1-0 til gestirnar.

Tann støðan helt sær, til seinni hálvleikur var um at vera hálvrunnin. Spælið hjá Skála hekk ikki serliga væl saman, og tað tóktist meira sannlíkt, at gestirnir skuldu økja um leiðsluna, tá teir fleiri ferðir kontraðu við fullari ferð móti heimaliðnum.

Tí var tað heldur merkisvert, at málið hjá Skála kom eftir kontraálop. Obi og Pauli G. Hansen stóðu fyri uppspælinum, og so kundi Kaplananovic senda bóltin í netið, eins og hann eisini gjørdi tað, tá Skála fyrr í vár vann dystin móti VB/Sumba í Vági.

### Fortreyt fyri yvirliving

Hjá VB/Sumba var dysturin fyrst og fremst tekin um, at liðið nú av álvara er við at stríða seg úr botninum.

Eftir at liðið fyrstu nógvu umførini tóktist fullkomuliga víst í einum niðurflytingarsessi, hava spælararnir veruliga reist seg seinastu dystirnar. Hugburðurin hevur verið, sum tað sømir seg hjá einum liði, ið stríðist fyri lívinum, og tað hevur eisini havt munandi batar í spælinum við sær.

Um tað verður nóg mikið at bjarga tilveruni í deildini er so eitt annað mál. Men fortreytin við at menn stríðast, er í øllum førum uppfylt.

Hjá Skála bendir hinvegin á, at liðið í mangar mátar verður partur av ongamannalandi í ár. Vána byrjanin bar við sær, at liðið mest sum alt fyri eitt misti møguleikan at leita heilt upp móti heiðursmerkjunum, og enn er tað væl niðurflytingarstrikan, sum teir skulu ansa mest eftir.

Seinastu mánaðirnar hevur liðið tó lyft seg væl frá somu striku, og tí kann tað kanska verða ein trupulleiki hjá monnunum, um teir ikki eru nóg motiveraðir til dystin. Hesa ferð stríddust teir væl, men spælið hekk í alt ov lítlan mun saman. Møguliga kann ein bati verða, um John Petersen sjálvur fer á vøllin. Venjarin kann flyta spæliloyvið til Skála í dag, og hann er neyvan tann vánaligasti trumfurin at senda á vøllin í eini knappari vending.

## Nú vilja vit vinna

Jón Krosslá Poulsen harmaðist sjálvandi um, at tað ikki eydnaðist VB/Sumba at halda fast um leiðsluna, sum teir høvdu á Skála. Men fyrst og fremst fegnast hann um hugburðin, sum liðið hevur sýnt seinastu dystirnar.

- Lagið í hópinum er heilt vist munandi betri nú, enn tað hevur verið. Menn eru klárir til hvønn tann einasta dyst, og vit trúgva avgjørt, at vit kunnu bjarga tilveruni í deildini.

- Hesa ferð skuldu vit tó vunnið, tí vit raka stólpan einaferð, umframt at ein av OKKARA bjargar á strikuni hjá teimum, so talan skuldi helst verið um trý stig, heldur Jón.

Komandi leygardag hava tit heimadyst móti NSÍ. Er tað ein uppgáva, sum er til at lyfta?

- Á heimavølli á jóansøku ivist eg ikki í, at allir fara inn á vøllin at stríðast av øllum alvi. Og so er tað líkamikið, um tað er NSÍ ella onkur annars, sum vit spæla ímóti.

## Ov lítið hugflog

Rúni Rasmussen hjá Skála var ikki nøgdur um spælið, sum hann og liðfelagarnir sýndu sunnudagin.

- Tað var ikki nóg gott. Onkursvegna, so var ov lítið hugflog yvir spælinum hjá okkum, og fram um alt, so hava vit ov lítla ferð á spælinum. Tað ger, at uppgávan hjá mótstøðuliðnum verður alt ov lørr, so vit ikki fáa lagt trýst á, sigur Rúni.

Men hann er tó ikki samdur í, at VB/Sumba kanska skuldi fingið sær stigini suður við.

- Eg haldi, at vit nú eisini skapa okkara kjansir. Og helst høvdu vit fleiri møguleikar, enn teir høvdu. Men samanumtikið, so var javnleikurin helst á góðari leið, sigur Rúni.

Tórshavn HB 1904 19 79 Stuðlar

**KÍ – HB**

Landskappingardystur verður
**í Klaksvík mikudagin kl. 18.00**
Bussurin koyrir úr Havn kl. 16.30
Stuðlafelagið heitir á øll viðhaldsfólk um at møta so fjølment sum gjørligt!
**Sigið frá hjá Sólbjørn, tlf. 23 25 37**
**Seinasta freist at tekna seg er týskvøldið kl. 22.00**